Miðskeiðis í fimti árunum íbirti táverandi løgmaður Christian Djurhuus tann sið at geva løgtinginum eina frágreiðing í sambandi við, at tingið varð sett á Ólavsøku.

Síðani tá hevur løgmansrøða hvørt ár verið hildin við tingsetubyrjan.

Løgmansrøðan hevur umrøtt gongdina og støðuna í landinum, og hevur løgmaður landsstýrisins vegna sagt frá teimum ætlanum, sum liggja fyri. Saman við løgmansrøðuni hevur verið handað løgtinginum hagtøl og skrivligt tilfar annars.

Í ár verður sjálv løgmansrøðan nakað stytri enn nærmastu árini frammanundan. Nakað av teimum upplýsingum, sum fyrr hava verið í sjálvari røðuni, er í staðin í notatformi lagt saman við skjølunum, og er samlaða tilfarið til løgtingið, pressuna og harvið eisini til almenningin ikki minni, heldur tvørtur ímóti.

Hetta er fyrsta frágreiðing frá løgmanni síðani seinasta løgtingsval og síðani nýggj samgonga varð skipað millum sjálvstýrisflokkin, fólkaflokkin og sambandsflokkin.

Tí vil eg nýta høvið til, landsstýrisins vegna, at seta fram ynski um gott og sakligt samarbeiði við løgtingið, ikki bert við áðurnevndu samgonguflokkar, men eisini við teir flokkar, sum nú sita í andstøðu á løgtingi.

---------

Tá nýggj samgonga verður skipað, og tá nýtt landsstýri verður valt, er bert náttúrligt, at byrjað verður við at kanna verandi gongdina og síðani gera støðuna upp í okkara samfelag.

Skal tað eydnast at reka hetta samfelag so skilagott sum gjørligt, so er neyðugt at kenna tey virðir og teir fyrimunir, sum samfelagið eigur. Eins neyðugt er at kenna vansarnar og teir trupulleikar, sum samfelagnum eru fyri. Ein kann illa loysa teir trupulleikar, ein ikki kennir.

Sjálvandi høvdu vit kenslu av samfelagsgongdini og -støðuni, tá samgongan varð skipað og landsstýrið varð valt. Síðani tá eru so komnir fram ymsir upplýsingar, sum gjøllari lýsa hesi viðurskifti. Eg haldi tað vera rætt og neyðugt í stórum at lýsa verandi gongd og støðu, og út frá hesum, eisini í høvuðsheitum, siga frá teimum ætlanum, sum landsstýrið hevur um tiltøk á teimum ymisku samfelagsøkjunum.

---

Tá ið landsstýrið tók við á nýggjárinum var bert ein fiskivinnuavtala fyri 1981 liðugt avgreidd, nevniliga við Sovjetsamveldið. Landsstýrið fór alt fyri eitt í holt við at byrja ella fullføra byrjaðar samráðingar við hini londini, ið Føroyar vanliga hava avtalur við um fiskiskap. Tað eydnaðist okkum at fáa avtalur við Ísland á sama støði sum í 1980 og við Noreg á eitt sindur hægri støði. Sama er um avtaluna við Sovjetsamveldið at siga. Við Svøríki fingu vit somu avtalu sum fyri 1980, og við DDR eina avtalu á munandi hægri støði. Frá Kanada hava vit í gjár fingið váttað, at toskakvotan við Labrador er økt við 1400 tonsum.

Viðvíkjandi EF gjørdist 1981 eitt satt vónbrot.

Landsstýrið royndi av øllum alvi at steðga tí niðurgongd í sínámillum fiskiskapinum, sum verið hevði. Hetta eydnaðist á pappírinum, tá ið sáttmáli varð undirritaður í Bruxelles 6. februar. Verunleikin gjørdist tó ein annar, av tí at bretar sýttu fyri at góðkenna sáttmálan. Hetta mál var fyri í ráðharrastovninum í Bruxelles so seint sum tann 27. í hesum, men úrslitið gjørdist tað sama, bretar sýttu framvegis.

Hóast tað, at ongin avtala hevur verið í gildið við EF higartil í ár, so hevur tó, vísandi til ríkisfelagsskapin, borið til at uppihildið donskum fiskiskapi í føroyskum sjógvi, og føroyskum fiskiskapi í donskum og grønlendskum sjógvi.

Í skjølunum er nærri greitt frá sáttmálasamráðingunum og teimum nøgdum, sum vit hava fingið og latið.

Eisini viðvíkjandi hvalaveiðu hava vit havt trupulleikar á millumlandastigi. Landsstýrið hevur nú sett í verk eina kanningarætlan viðvíkjandi hvali, sum millum annað førir við sær, at nakrir fáir hvalir kunnu verða skotnir. Landsstýrið metir ikki, at tað í longdini ber til at lata vera við at gera nýtslu av hesum parti av tí livandi ríkidøminum á havøki okkara, og vónar, at tær kanningar, sum nú eru settar í verk, fara at vísa, at stórhvalaveiða við innanlands tvøstnýtslu fyri eyga fer at lata seg gera.

Landsstýrið roynir eisini at stuðla teimum einstaklingum, bæði skipaeigarum og øðrum, ið royna at finna fram til nýggjar samvinnuhættir innanfyri fiskivinnu við menningarlond.

Seinasta ár høvdu vit metár í útflutningi við eini útflutningsupphædd uppá góða milliard krónur brutto.

Fyrra hálvár í ár hevur roynst verri við eini afturgongd uppá umleið 15% sammett við sama tíðarskeið í fjør.

Hóast tveir teir seinastu mánaðirnir vísa rekordhøg útflutningstøl, serliga frá flakavirkjunum, so er tó vandi fyri, at árið 1981 ikki fer at geva tann útflutningsvøkstur í krónum, sum tey seinastu fimm árini hava givið.

Orsøkin er fyrst og fremst tann minkandi veiðan á fjar- og miðleiðum orsakað av kvotatrupulleikum.

Tørvandi sáttmáli við EF hevur minkað munandi um útflutningin. Tað, at veiðan eftir toski í Grønlandi framvegis ikki verður loyvd føroyingum, at veiðan eftir rækjum alt verður meira avmarkað, hevur eina munandi negativa ávirkan á okkara útflutning.

Støðugt hækkandi útflutningsprísir bøta um myndina, t.d. er rækjuprísurin í dag næstan dupult so høgur, sum fyri ári síðani.

Prísurin á saltfiski hevur verið støðugt hækkandi, og hóast ávísir tvørleikar hava tikið seg upp, so eru útlit til stabilar prísir út á heystið.

Orsakað av ávísum trupulleikum liggur nógvur saltfiskur á goymslu, men verður hann avskipaður aftaná 1. september.

Prísurin á upsa hevur verið og er støðugt vaksandi. Her er tað serliga EF-londini Týskland og Frakland, sum hava verið góðir marknaðir fyri hetta fiskaslag, sum hevur stóran týdning fyri okkara heimafiskiskap og fyri flakavirkini.

Laksur hevur fingið stóran týdning fyri okkara útflutning. Prísirnir vóru høgir til februar mánað í ár, tá fóru prísirnir munandi niður. Hetta er ikki óvanligt orsakað av sæson fyribrigdum, og hevur marknaðurin gjørt vart við, at meira kundi fingist burtur úr fíggjarliga, um fiskiskapurin var byrjaður fyrr og endaði tilsvarandi fyrr. Landsstýrið umhugsar henda spurning.

Alt samanumtikið eru framtíðarútlitini fyri sølu av okkara fiskavørum góð. Valutaviðurskiftini hava tó avgerandi týdning fyri fíggjarliga úrslitið.

Saman um tikið, ber tó illa til at koma til annað úrslit, enn at heildarmyndin av gongdini í og støðuni hjá føroyska samfelagnum er døpur á at líta.

Yvir fyri úrheiminum hevur føroyska samfelagið stórt og eftir øllum at døma, vaksandi hall.

Kann nevna, at vit tey seinastu trý árini hava keypt (innflutt) fyri næstan 800 milj.kr. meira enn vit hava selt (útflutt) fyri.

Okkara netto uttanlandaskuld (samlað skuld við frádrátti av tí vit hava tilgóðar) er í dag meira enn 1 milliard krónur.

Tað er óneyðugt hjá mær at siga frá, at henda skuld skal gjaldast aftur. Og fyri at gjalda hana aftur, so skulu vit venda gongdini í Føroyum heilt avgerandi betra vegin. Vit skulu broyta eitt stórt árligt núverandi undirskot til eitt yvirskot í staðin.

Áðurnevndi innflutningur er í ovurstóran mun farin til almenna nýtslu, til privata nýtslu, til íløgur, sum ikki renta seg sjálvar og til beinleiðis óproduktivar íløgur.

Tað er tíverri ein sannroynd, at vit í dag standa við einari høvuðsvinnu, sum illa er før fyri at bera seg, sjálvt um hon fær árligt endurgjald frá tí almenna uppá meira enn 200 milj. kr.

Og framtíðarútlitini fyri hesa vinnu, sum er okkara altavgerandi innløgukelda, eru ikki alt ov ljós.

Vit vera trongdir burtur av fjarleiðum, og okkara høvuðsstovnar á heimaleiðum sigast ikki at vera nóg væl fyri.

Seinasta árið er hugurin til at gera nýggjar íløgur í okkara fiskiflota minkaður í stórum, samstundis sum hugurin hjá alt fleiri av teimum, sum eiga skip, er vaksin til at sleppa av við skip - her íroknað nøkur av okkara bestu.

Tær íløguætlanir, sum hóast alt koma fyri, ganga í stóran mun út uppá at útvega brúkt og eldri skip, av og á í sambandi við útflytan av frægastu skipum okkara.

Alt meðan hugurin til nýíløgur fellur og hugurin til at sleppa av við skip økist, so leita fleiri og fleiri av okkara bestu sjómonnum burtur í onnur lond at vinna.

Harmiligt er, at okkara samfelag, sum nú er, ikki er ført fyri at útvega íbúgvum sínum dagligt starv.

Eg vil í hesum sambandi strika undir, at teir av okkara sjómonnum og onnur, sum vegna tørvandi yrkismøguleikar, leita burtur í vinnu, men hava fasta bústað sín her og soleiðis bera vinningin heim aftur til landa, teir eiga minst líka stóra tøkk uppiborna, sum vit aðrir, sum sleppa frá at leita burtur.

-------------

Nevndi í áðni, at vit skylda útlondum meira enn 1 milliard krónur netto. Hetta er ein munandi størri skuld uppá seg enn netto uttanlandsskuldin hjá okkara grannalondum.

Nettouttanlandsskuldin fevnir um samlaðu skuldina bæði á tí almenna og privata samfelagsøkinum.

Vøksturin í uttanlandsskuldini hevur verið ovurstórur seinastu árini, og hevur tað almenna ligið á odda í hesi lántøku.

Nevnast kann, at tað almenna fyrra hálvár í ár hevur upptikið lán uttanlands uppá minst 230 milj.kr., harav 73 milj.kr. til at gjalda falnar avdráttir, sum peningur ikki var til.

Samlaða uttanlandsskuldin hjá tí almenna var 1. januar 1981 meira enn 1 milliard krónur. Dregur ein ogn uttanlands frá, so er nettouttanlandsskuldin hjá tí alemnna 890 milj.kr.

Kann eisini nevna, at hóast allar hesar lántøkur, so er likviditetsstøða landskassans so vánalig, at tað ikki hevur verið gjørligt at gjalda hvørjum sítt til tíðina. T.d. skyldar landskassin stórar upphæddir til Lønjavningargrunnin og Ráfiskagrunnin.

At likviditetsstøðan er vánalig kann ikki undra. At hon ikki er verri, enn hon er, hevur sína orsøk í, at stórur partur av tí peningi, sum fíggjarlógirnar hava lagt av til ávís endamál, men sum ikki eru framd, er farin til onnur endamál og soleiðis lætt um likviditetsstøðuna, men er so ikki tøkur peningur til tær tilætlaðu uppgávurnar.

Seinastu tvey árini er meirnýtslan í mun til fíggjarløgtingslógirnar minst 40 milj.kr. Eykafíggjarlógir verða lagdar fyri tingið í næstum. Herumframt vísir ein "likviditetsprognosa" fyri restina av fíggjarárinum, at aðrar útvið 40 milj.kr. koma at resta í. Og tá er ikki tikið við tað, sum átti at verið lagt til grunnarnar.

---

Kanska onkur heldur, at eg í míni lýsing av núverandi gongdini og støðuni eri heldur svartskygdur. Lat okkum vóna, at so er.

Men eitt er víst. Vit føroyingar standa í dag í eini støðu og yvirfyri trupulleikum, sum ikki verða loystir eftir einum degi ella tveimum.

Og teir verða ikki loystir uttan so, at vit øll hjálpa til.

Tað sum gerast skal kann býtast upp í fimm høvuðslutir.

Fyri tað fyrsta mugu og skulu vit fremja tiltök innan- og uttanfyri fiskivinnuna, sum skapa innlögur til okkara samfelag. Tiltökini krevja í forhond stórar íløgur, meðan innlögurnar í besta fall koma nakað aftaná.

Tá vit so frammanundan bera uppá eina alt ov stóra uttanlandsskuld, og lítil og ongin peningur er í landinum, so er longu á íløgustiginum stórir vansar at vinna á.

Fyri tað næsta mugu og skulu vit spara. Vit skulu tálma í hvussu so er í vøkstrinum í almennu rakstrarútreiðslunum, og helst rakstrarútreiðslunum sjálvum.

Vit skulu tálma privatnýtsluni her á landi.

Vit skulu avmarka almennu íløgurnar. Tað er ein veruleiki, at vit ikki hava ráð til óavmarkaðar almennar íløgur til endamál, sum ikki eru tvingandi neyðug, íløgur, sum næstan altíð föra við sær vökstur í almennu rakstrarútreiðslunum.

Vit skulu hava meira pening inn frá föroyska borgaranum. Hetta er neyðugt fyri at hava almenna "sektorin" gangandi, sum hann nú er útbygdur, herundir tær yvirtökur, sum framdar eru seinastu árini. Hetta er eisini neyðugt fyri at koma ájavnt og kunna gjalda millum annað ta yvirnýtslu, sum eg nevndi í áðni, tað likviditetshall, sum verður í inniverandi fíggjarári, og at byrja at gjalda inn í grunnarnar tað, sum sett er av til ávís endamál.

Meira inn frá borgarunum.

Hövuðsháttirnir eru álíkning av skatti, álegging av innflutningsgjöldum, av tolli og öðrum avgjöldum og gjöld fyri tænastuveitingar av ymiskum slagi.

Landsstýrið hevur higartil verið og ætlar at vera á varðhaldi yvir fyri almennum stovnum, tá talan er um at hækka gjöld fyri tænastur. Orsökin er ynski um, at stovnarnir skulu spara, og ynski um at sleppa borgarunum undan ov stórum vøkstri í livikostnaðinur. Í summum førum er tó neyðugt at loyva hækkanir, millum annað tá prísur á olju og vørum uttanífrá hækkar.

Innflutningsgjöld og onnur avgjöld.

Meirinnkrevjingin fer fyrst og fremst at liggja í tolli og avgjöldum. Roynt verður at sleppa veruligum neyðsynjarvörum undan ov stórum hækkingum, og at lata tær vörur, sum ikki eru so neyðugar, bera hækkingina í tolli og avgjöldum. Roynt verður eisini, at lata vera við at leggja ov högan toll og ov stór avgjöld á rávörur til ídnað, handverk v.m.. og at sleppa rávörum og lutum til föroyskt framleiddar vörur til útflutnings undan tolli og avgjöldum. Alt hetta ger, at roknast má við munandi hækkingum á teimum vørum, sum ikki koma undir neyðsynjarvørur.

Skattur.

Tað er ikki ætlanin at áleggja borgarunum hægri landsskatt, enn talan nú er um. Harafturímóti verða royndir nú gjördar at fáa tann skatt, sum álíknaður er, inn og helst til tíðina.

Viðurkennast má, at núverandi skattaskipan er ikki í lagi, serliga aftaná tær broytingar, sum framdar vóru herfyri.

Ein arbeiðsbólkur er nú settur, og landsstýrið ætlar at leggja fram fyri tingið uppskot til samtíðarskatting, sum helst skuldi komið at virka frá ársbyrjan 1983.

Tað er sum sagt ikki ætlanin at álíkna borgarunum hægri skatt enn nú, men at tryggja eina rættvísari álíkning, og at tryggja at tann álíknaði skatturin kemur inn til landskassan í somu lötu, lönin verður útgoldin.

Á vinnuökinum, har samtíðarskattaskipan ikki rökkur, er eisini ætlanin at gera broytingar við tí fyri eyga, at öll

tann lönarinntöka, sum vinnulívsmaður tekur burtur úr vinnufyritöku verður skattaður beinan vegin sum samtíðarskattur. Fisini er ætlanin við skattaskipanini at eggja til at lata peningin standa í vinnuni, og tryggja at vinningsbýtið og allur tann peningur annars, sum verður tikin úr vinnuvirki, verður skattaður fult út.

Avmarkan av almennum íløgum.

Tvær høvuðsorsökir eru til at ansa eftir á hesum öki. Deils hava vit ikki pening til fígging av íløgum, sum ikki eru strangt neyðugar. Deils föra almennar íløgur ofta við sær eina áhaldandi og stóra hækkan í almennu rakstrarútreiðslunum.

Í samband við samtyktina av fíggjarlögtingslógini fyri inniverandi ár varð avgjört at steðga ætlaðu bergholsgerðunum til smáplássini, og at útseta ætlaðu útbyggingina av Skopunar havn.

Læt meg strika undir, at henda avgerð í sjálvari sær ikki var vend ímóti hesum ávísu plássunum. Vóru tilsvarandi ætlanir í öðrum plássum, vórðu tær eisini steðgaðar ella útsettar.

Tálman av privatu nýtsluni.

Sum nevnt verður tað neyðugt at krevja meira pening inn frá borgarunum, og förir hetta við sær eina ávísa tálman av privatu nýtsluni.

Herumframt er ætlanin at koma við serligum tiltökum, sum eisini föra við sær minni privata nýtslu.

Tiltök innan og uttanfyri fiskivinnuna.

Nökur dömi um hesi verða umrödd niðanfyri undir teimum einstöku ökjunum.

Fiskivinnan.

Í ávísan mun havi eg longu umrött fiskivinnuna.

Sum nevnt verður stórt endurgjald latið úr landskassanum. Ynskiligt er heilt at sleppa undan hesi skipan, men er tað ikki gjörligt, sum nú er. Hinvegin verður arbeitt fram ímóti eini betri skipan fyri hesum endurgjaldi.

Sum nevnt í áðni, so tykjast høvuðsfiskastovnarnir ikki at vera so væl fyri.

Umhugsað hevur verið at seta veiðubann ávísar tíðir av árinum. Eftir upplýsingum frá Fiskirannsóknarstovuni og Fiskivinnuráðnum, verður hetta ikki sett í verk beint nú. Hinvegin er ætlanin at seta fram lógaruppskot um at geva Fiskirannsóknarstovuni heimild at steðga fiskiskapi á einum öki í avmarkaða tíð, har tað vísir seg, at veiddur fiskur er ov smáur.

Fyri at forða fyri, at veiðutrýstið á tosk og hýsu verður ov stórt, verður umhugsað at seta mark fyri, hvussu nógv trolararnir og partrolarar kunnu hava av toski og hýsu av samlaðu veiðuni.

Onnur tiltök, sum kunnu koma upp á tal eru t.d. broyting í húkastöddum og meskavíddum og kvotering.

Arbeitt verður við einum uppbýti av okkara fiskigrunnum, sum kann gera tað lættari at leggja til rættis eina rímiliga og rætta rökt av okkara heimafiskiskapi.

Vit eru fleiri sum halda tað vera rætt at steðga fiskiskapi sunnudag. Hetta samsvarar við arbeiðslag føroyinga, og minkar harafturat um veiðutrýstið.

Undir öllum umstöðum verður tað neyðugt at ansa vær eftir okkara fiskastovnum, serliga at verja tann smáa fiskin. Gera vit tað, skuldi út frá fyriliggjandi upplýsingum verið möguligt seinni at fingið störri nögdir upp úr heimasjógvi til eitt störri virði.

Ætlanin er at stuðla nótabátunum, sum eru serliga illa fyri í ár, tilat fiska svartkjaft. Eisini verður arbeitt við möguleikunum at böta um hjá útróðrarbátunum.

Sum er fáa vit ov lítið virði upp úr okkara egna sjógvi. At tað er neyðugt at fremja tiltök fyri at avmarka veiðuna eftir okkara høvuðsfiskastovnur, bötir ikki um ta stöðuna fyrstu tíðina, tvørtur ímóti, men skuldi gjørt tað, tá reguleringstiltøkini hava virkað.

Vit eiga tí at leggja doyðin á at kanna möguleikarnar at útnytta aðrar fiskastovnar í egnum sjógvi. Her verður serliga hugsað um svartkjaft.

Í föroyskum sjógvi er fiskaður nógvur svartkjaftur, og skuldu vit átt stóran lut av hesum stovni í okkara part. Vónandi verður samlaða veiðan av hesum stovni rímuliga avmarkað innan stutta tíð. Landsstýrið vil gera tað, sum möguligt er hesum viðvíkjandi. Umframt at fiska svartkjaft til ídnað, so hava royndir verið gjördar at virka svartkjaft til matna, bæði á landi (Bakkafrost) og umborð á skipi (Giljanes). Landsstýrinum kunnugt eru menn bjartskygdir út frá úrslitunum higartil, bæði viðvíkjandi fiskiskapi, tilvirking og sölumöguleikum.

Áhugi er fyri at gera íløgur í hesa vinnu. So skjótt royndirnar vísa nóg haldgott prógv fyri vinnumöguleikum á hesum öki, fer landsstýrið at stuðla víðari útbygging bæði á sjógvi og landi. Talan er um so stórar nögdir, at eitt samlað gott úrslit viðvíkjandi framleiðslu og sölu av svartkjafti til matna kundi gjört tað lættari at bygt uppaftur aðrar fiskastovnar og gjört tað möguligt at komið burtur úr teimum trupulleikum, vit eru í.

Ein veiðugrein, sum kemur at geva trupulleikar í komandi tíð, er laksaveiðan. Ikki tí at fiskiskapurin ikki er góður. Úrslitið er nakað betri í ár enn í fjör. Men ágangurin uttanífrá móti okkara laksaveiðu hevur verið sera harður, og harðnar í hvörjum. Beinleiðis at seta tiltök í verk ímóti okkum fyri hesa veiðu, kann eftir öllum at döma koma uppá tal. Laksaspurningurin hevur ein sera týðandi leiklut, tá ið samráðst verður um fiskiveiðusáttmálarnar við EF og onnur grannalond. Til tess at lætta um samráðingartrýstið, verður neyðugt at seta munandi av laksasmolti út. Eisini er tað ein spurningur, um loyvi verður givið til teir smærru bátarnar at fiska laks á vetri. Hetta er neyvan forsvarligt.

Landskassin hevur longu í fleiri förum veðhildið fyri royndir at fiska í fyri okkum higartil fremmandum sjógvi. Úrslitini hava higartil ikki verið alt ov góð.

Kannað verður hvussu vit best leggja til rættis á hesum öki. Kann nevna at landsstýrið hevur boðað donsku stovnunum IFU og Danida til seminar í Tórshavn fyrst í september mánaða. Ætlanin er, at umboð fyri föroyskt vinnulív skulu luttaka í hesum seminari.

Ídnaður.

Fiskiídnaðurin má síggjast í samband við fiskivinnuna sjálva. Talan er um eitt stórt endurgjald frá tí almenna fyri at fáa hesi virksemi undir einum at bera seg.

Mett verður, at orkan innan Flakavirkir er nóg stór í mun til ta rávøru, sum kann fáast. Áhugi er fyri øðrum fiskiídnaðarvirkjum, og er landsstýrið sinnað at stuðla so langt til ber.

Alt bendir á, at rætt hevði verið við einari størri frystigoymslu til nýtslu hjá føroyskum fiskavirkjum v.m. Ávís kommuna hevur bjóðað grundøki til slíka goymslu og er bílig orka tøk á staðnum.

Eitt stórt tal av ídnaðarvirkjum í vanligum týdningi eru stovnsett. Summi tiltøk síggja út til at hava livimøguleikar. Onnur sýnast ikki at hava livilíkindi, hóast menn vóru fúsir at investera,og lánistovnar v.fl. vildu stuðla.

Ætlan landsstýrisins er at stuðla skipabygginini. Mannagongdin at forða fyri munandi innflutningi av fiskiskipum fer eisini at eggja monnum at byggja síni skip heima á landi, ið hvussu so er tey smærru skipini.

Ein ídnaðargrein, sum landsstýrið ætlar at stuðla, er framleiðsla av vindmyllum. Eyðsæð er, at vindmyllur sum slíkar ikki eru líðugt útviklaðar enn, men hetta verður ivaleyst ein vøra, sum í framtíðini fær stóran týdning. Tí er tað rætt, at vit, ið hvussu so er í smáum, fylgja við í útviklinginum og soleiðis eru førir fyri at útbyggja, tá eftirspurningur og tekniskir møguleikar gera tað rætt.

Sum er kunnu øll sunn ídnaðartiltøk rokna við at fáa fíggjan.

Landsstýrið metir, at verandi fíggingarstovnar eiga at útbyggjast, og at aðrir fíggingarstovnar verða stovnaðir til fíggjan av virksemum, sum ikki kunnu fáa fíggjan á verandi stovnum, t.d. fiskaalistøðir, smoltstøðir, pelsdjóraalistøðir o.s.fr.

Kannað verður, um vit kunnu fáa nakað av peningi til tílík endamál úr Nordiska Investeringsbanken.

Sum annars nevnt er ætlanin at lætta um toll og avgjøld á rávørum til ídnað, handverk v.m. og at sleppa rávørum til framleiðslu til útflutnings undan tolli og avgjøldum. Arbeitt verður við einum nýggjum býti av vørum innan tollreglurnar.

Fiskaaling og smoltframleiðsla v.m.

Ein av framtíðarinnløgumøguleikunum átti at verið aling av laksi, sílum, skeljadjórum v.m.

Vit hava nøkur fá royndarbrúk í gongd. Høvuðsorsøkin til at fleiri ikki kunnu byrja er tørvur á smolti.

Tað hevur ikki verið hildið ráðiligt at innflyta útlendskt smolt, og okkara egna smoltframleiðsla er alt ov lítil enn.

Stórur áhugi er fyri at gera íløgur í alistøðir og eisini er áhugi fyri at gera íløgur í smoltstøðir. Deils er p/f Fiskaaling í ferð við at byggja út. Deils eru privatir áhugaðir fyri tílíkum projektum. Landsstýrið hevur fingið til umhugsunnar projekt, sum kann framleiða 1½ milj. smolt árliga.

Umframt til aling verður neyðugt at framleiða smolt at seta út, jbr. umrøðuna av laksafiskiskapinum.

Vit standa nærum á berum botni á hesum øki. Landsstýrið hevur sett arbeiðsbólk at kanna møguleikarnar, og landsstýrið arbeiðir við at útvega fíggjan til tílíkar íløgur.

Pelsdjóraaling.

Landsstýrið hevur samtykt at seta niður arbeiðsbólk til at kanna møguleikarnar á hesum øki. Ein verkfrøðingur hevur fyri landsstýrið gjørt eitt fyribils álit um pelsdjóraaling, og bendir hetta á, at møguleikar eru fyri lønandi vinnu.

Farmasigling.

Nógv hevur verið tosað um farmasigling sum alternativa vinnu.

Landsstýrið ivast ikki í, at her liggja møguleikar. Vit hava allar fortreytir fyri at røkja eina tílíka vinnu, ikki minst tá hugsað verður um okkara menn, sum í dag mannað tann danska handilsflotan. Landsstýrið hevur longu lagt fyri tingið og fingið samtykt nýggjar reglur fyri fíggjan av farmaskipum. Í dag hava føroyingar nakrar av heimsins bestu fíggjanarmøguleikum til bygging av nýggjum farmaskipum.

Sáttmáli er gjørdur um bygging av nøkrum skipum, og áhugi er fyri at gera fleiri.

Landsstýrið fer støðugt at fylgja við spurninginum og stuðla so frægt sum gjørligt.

Landbúnaður.

Játtanirnar til landbúnaðin eru munandi hækkaðar og verða ymisk tiltøk sett í verk fyri at bøta um úrtøkuna á hesum øki.

Til heystar verður farið undir at endurskoða jarðarlóggávuna og ta reglugerðina jarðarráðið arbeiðir eftir.

Strandferðslan.

Strandferðslan er sera kostnaðarmikil stovnur. Nakað er gjørt fyri at minka um útreiðslurnar á hesum øki. Munandi meira kann gerast og eigur at verða gjørt. Millumlandasiglingin hjá Strandferðsluni hevur samanumtikið givið ringar royndir, og hevur kostað føroyska samfelagnum nógvan pening. Vetrarsiglingin er steðgað. Í sambandi við millumlandasiglingina er umsitingin hjá Strandferðsluni á landi økt í stórum. Ætlanin er at minka um hesa umsiting, serliga á ferðamannastovuøkinum.

Bussruturnar.

Á hesum oki er ætlanin at minka um túratalið á verandi rutum og at nýta tað soleiðis sparda      til onnur pláss. Arbeitt verður við at finna bestu skipanina á hesum øki.

Helikoptaraflúgvingin.

Royndarflúgvingin fer fram. Er úrslitið nóg gott, verður hildið við flúgving alt árið. Smáplássini og útoyggjarnar fáa tá alt árið ferðasamband annaðhvønn dag, og eina ferð um vikuna verður møguleiki at koma frá á morni og heimaftur sama dag. Royndarflúgvingin verður gjørd av Mærsk Air og umsitin av Strandferðsluni. Framhaldandi flúgving ætlast røkt av P/F Flogsamband.

Uttanlandsflúgving.

Landsstýrið kannar møguleikarnar fyri samarbeiði innan flúgving millum føroyingar og bretar. Eydnast at fáa tílíka flúgving í lag, so verður arbeitt víðari fyri samarbeiði við aðrar. Føroysk luttøka í flúgvingini millum Danmark og Føroyar verður eisini viðgjørd.

Vegir og havnir.

Fyribils verður arbeitt víðari út frá teimum ætlanum, sum undanfarna løgting og landsstýri høvdu lagt, tó við smærri játtanum.

Fíggjarvánirnar gera tað neyðugt at halda aftur á hesum eins og á øðrum økjum.

Í samráð við bygdarráðið í Skopun er fyribils ein onnur loysn funnin við víkjandi havnalagnum har. Havnin verður gjørd djúpari, fundament til ferjulegu verður gjørt og portur sett fyri. Hvussu ið víðari verður hildið fram avhongur av úrslitinum av útbyggingini, sum nú fer fram.

Orkumál.

Teir støðugt hækkandi oljuprísirnir tyngja framvegis munandi um búskapin innan flestu øki í samfelagnum. Arbeitt verður við ætlanum um at minka um nýtsluna, lutvíst við beinleiðis sparing og lutvíst við umlegging til annan teknikk fyri at bøta um nýtsluúrtøkuna.

Í samvinnu við Orkuráðið fer landsstýrið at seta tiltøk í verk,

sum miða ímóti, at minkast kann um innflutningin av olju.

Tær ætlaðu vatnmegisútbúgvingarnar hjá SEV í Vágum, Vestmanna og í Eysturoynni hava verið og eru framvegis til nágreiniligar kanningar hjá Orkuráðnum. Endaligaummælið av samlaðu 10-ára byggiætlanini er væntandi um stutta tíð. Serfrøðingar eru í høvðusheitunum samdir um at ráða til, at útbygt verður eftir teimum sjónarmiðum, ið ganga fram av útbyggingarætlanum SEV's, og landsstýrið fer at mæla til, at farið verður undir at fremja útbygging sum skjótast.

Kommunumál.

Fleiri av teimum føroysku kommununum eru ikki serliga væl fyri fíggjarliga.

Ætlanin er at broyta býtiðav inntøkum og ábyrgd millum land og kommunu. Endamálið er at gera kommunurnar meira sjálvstøðugar.

Landsstýrið arbeiðir við spurninginum um studning frá ríkinum til havnabygging. Ein loysn á hesum øki vildi lætt munandi um hjá fleiri kommunum.

Postverk Føroya.

Roknað verður við, at Postverk Føroya í verandi ári hevur eitt hall uppá 5 til 6 milj.kr.

Postverkið hevur heitt á landsstýrið um loyvi til at hækka postgjøldini. Landsstýrið metir, sum áður sagt, at vit eiga at verða varnir við at loyva hækkanir av gjøldum fyri almennar tænastur.

Telefonverk Føroya Løgtings.

Eisini telefonverkið hevur hall í ár uppá 2-3 milj.kr. Nýggja automatstøðin í Tórshavn er sett til. Hetta fer væntandi at bøta munandi um telefonviðurskiftini og væntandi eisini um rakstrarúrslitið.

Skúlamál.

Byggingin av deild av Føroya Handilsskúla í Havn verður boðin út og kann byrjast í heyst.

Tá ið at handilsskúlin er liðugur, er ætlanin at fara undir bygging av maskinskúlanum.

Nevnd er sett at endurskoða og nútímansgera lærlingalógina.

Lógaruppskot um nýggjan studentaskúla í Eysturoy verður greitt at leggja fyri tingið í næstum.

Landsstýrið fer at leggja serligan dent á at útbyggja útbúgvingina hjá teimum 16 - 19 ára gomlu.

Heilsumál.

Álit um útbygging av føroyska sjúkrahúsverkinum frá ráðleggingarnevndini fyri Sjúkrahúsverk Føroya verður lagt fyri tingið í næstum.

Tann primera heilsutænastan verður útbygd.

Almannamál.

Á hesum øki fer ein framhaldandi útbygging fram. Eins og fyri skúlamál, heilsumál og onnur mál verður víst til skjølini í notatformi, har meira nágreiniliga er greitt frá.

Húsalánsgrunnurin.

Ætlanin er at broyta reglurnar fyri útlán grunsins í hesi tingsetuni. Endamálið er at veita meira rímilig lán og samstundis at fáa peningin skjótari inn aftur í grunnin. Tó er ætlanin ikki at økja um rentur og avgjøld av lánum úr Húsalánsgrunninum tey fyrstu árini av avdráttartíðini. Ætlanin er eisini at eggja til byggjan av smáum raðhúsum og/ella íbúðum.

Mentamál.

Hóast vánaligar fíggjarvánir er ætlanin at veita størst møguligan stuðul á hesum øki.

Føroyahúsið.

Leingi hevur verið tosað um at útvega føroyskum útisetum í Keypmannahavn hóskandi høli at búleikast í.

Landsstýrið og fíggjarnevnd hava samtykt, at landskassin letur pening til húsaleigu, ljós og hita til eitt ávíst leigumál.

Ætlanin er, at hetta tiltak skal rekast á sama hátt, sum tað ætlaða Føroyahúsið, inntil hetta einaferð kemur upp at standa.

Umsitingarmál.

Landsstýrið og umsitingin hava vánalig og trong hølir at húsast í. Fíggjarviðurskiftini gera tað ógjørligt at byggja tann nýmótans bygning til endamálið, sum einaferð má koma.

Fyri møguliga at hjálpa uppá støðuna verður umhugsað at byggja omaná Sjóbúðargrundina úti í Tinganesi.

Landsstýrið hevur sett seg í samband við býararkitektin og biðið hann kanna møguleikarnar fyri, at hesin bygningur verður bygdur soleiðis, at hann fyrst verður nýttur til skrivstovuhølir, og seinni til løgtingssal, nevniliga tá nýggjur umsitingarbygningur verður bygdur.

Hetta hevði gjørt tað møguligt einaferð fram í tíðina at flutt Føroya Løgting út aftur í Tinganes.

---

Eg havi roynt í stuttum at meta um gongdina í okkara samfelag, um stöðuna vit eru í, og sagt frá nökrum av teimum tiltökum, sum landsstýrið kundi hugsað sær at sett í verk. Sjálvandi kundi nógv verið lagt afturat. Ivaleyst kemur nógv, eisini nógv annað, fram undir viðgerðini av hesi röðu.

Eg vil eina ferð enn minna á, at okkara trupulleikar, sum eg meti vera sera stórar, ikki verða loystir, uttan at allir föroyingar leggja rygg til.

Ofta hevur verið sagt av monnum, at vit föroyingar kunnu ikki loyva okkum at taka ímóti tí endurgjaldi, sum danski staturin letur til gjald av felagsökjum. Tað skal vera mannminkandi. Her kunnu meiningarnar vera ymiskar.

Men eitt máttu vit öll kunna blivið samd um. Vit kunnu ikki loyva okkum bæði at hava metútflutning uppá meira enn 1 miljard krónur og at fáa statsstuðul uppá 400 milj. kr. og kortini hava eitt risastórt undirskot tá avtornar. Hetta hendi í fjör. Nakað líknandi hendi fyrra árið, og úrslitið í ár verður ikki nógv annarsleiðis.

Hetta er mannminkandi fyri okkum sum tjóð.

Teir gomlu hövdu ikki ypt öks og latið staðið til. Teir hövdu í staðin smoygt upp um armar og samstundis sett nýtsluna niður. Teir dugdu at laga seg. Teir kláraðu seg undir skiftandi umstöðum.

Her er talan um hövuðsstöðutakan, ella tað sum danir kalla "holdning".

Föroyar og föroyingar hava fyrr staðið yvir fyri trupulleikum. So stórum trupulleikum, at menn ivaðust í, um hesir kundu loysast. Hövuðsstöðutakan föroyinga fördi við sær, at trupulleikarnir vórðu loystir.

Vit eru förir fyri at loysa okkara trupulleikar, um vit vilja - ur vit eru tilreiðar at viðurkenna stöðuna, sum hon er, og taka avleiðingarnar av hesi stöðu.

Sitandi samgonga og nýggja landsstýrið hava virkað eitt hálvt ár. Eitt rímiligt innkoyringstíðarskeið.

Vit hava havt ávísar trupulleikar, serliga í byrjanini, ikki orsakað av ágangi frá andstöðuni, men orsakað av teimum tillagingarspurningum, sum heilt náttúrliga stinga seg upp í byrjanini av einum samarbeiði.

Til andstöðuna vil eg loyva mær at siga. Vit ganga út frá, at tit, tá tit fáa föturnar fyri tykkum, fara at virka sum andstöða. Og tað hava tit fullan rættin til. Tit hava enntá skyldu til tað.

Til samgonguna vil eg loyva mær at siga. Vit 17 lögtingsmenn samráddust og samdust um at reka ein ábyrgdarpolitikk. Skulu vit náa hetta mál, so er neyðugt, at allir 17 eru tilreiðar, deils at bera skatta- og tollbyrðar, sparitiltök og onnur tiltök saman við restini av okkara fólki, men sanniliga eisini at bera tær politisku byrðar, sum standast av at áleggja okkara egnu hesar somu byrðar.

At enda vil eg eina ferð enn ynskja gott samarbeiði millum landsstýri og lögting - bæði samgongu og andstöðu.